

## Essien longt um sáttmálan

Ghanesiski miðvallarleikarin hjá Chelsea, Michael Essien, hevur longt um sáttmálan við ensku meistararnar. Hann hevði trý ár eftir av sáttmálanum við Chelsea, men longu nú hevur hann gjørt av at leingja um henda sáttmála. Nýggi sáttmálin bindur Chelsea og Essien fram til summarið 2012. Essien kom til Chelsea frá Lyon í 2005 fyri á leið 260 milliónir kr., og hann er m.a. valdur til triðbesta spælara í Afrika síðstu tvey árini. Essien hevur spælt heilar 46 dystir fyri Chelsea hetta kappingarárið.

## Spælari tikin fyri doping

Enn ein italskur spælari er tikin fyri doping. Hetta kunngjørdi olympiska nevndin í Italia, CONI, í gjár. Talan er um málmannin hjá Messina, Nicolas Caglioni. Messina, sum liggur í botninum í italsku seriu A, má tí vænta at vera málmannin fyri uttan í eina tíð. Caglioni er triðji spælarin í seriu A, sum er tikin fyri doping hetta kappingarárið. Fyrst bleiv Milan-spælarin, Marco Boriello, dømdur leikbann í tríggjar mánaðir fyri at hava nýtt doping, og seinni bleiv Francesco Flachi hjá Sampdoria tikin fyri at nýta kokain.

# Dia visti av ongum

**VÍF boðaði í morgun frá, at felagið og venjarin, Dia Midjord, vóru samd um at steðga samstarvinum. Dia sigur tó, at hesa avgerð eigur nevndin sjálv, tí hann visti av ongum**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

VÍF hevur verið greitt oddalið í bestu mansdeildini í hondbólti í at kalla alt ár. Byrjanin uppá kappingini var ikki tann allarbesta, men tá teir vóru komnir í gongd, so var einki lið, sum megnaði at steðga teimum í grundspælinum, sum teir vunnu rættiliga trygt.

Gongdin í endaspælinum hevur tó ikki verið eins góð og í grundspælinum. Fleiri lið hava hótt við at tikið finaluplássið frá vestmenningum, og tá teir kiksaðu ímóti Neistanum um vikuskiftið, kundi tað blivið heilt spennandi. Hini úrslitini lagaðu seg tó soleiðis, at VÍF er klárt til FM-finaluna, sjálvt um teir taptu fyri Neistanum.

Nevndin í VÍF var tó ikki nøgd. Í morgun kom tíðindaskriv sendandi, har nevndin boðaði frá, at hon og venjarin vóru samd um at steðga samstarvinum, tí at samstarvið millum venjara og spælarar hevur ikki verið nóg gott síðstu dystirnar.



*VÍF boðaði frá í tíðindaskrivi í morgun, at felagið og venjarin, Dia Midjord, eru samd um at steðga við samstarvinum.*

### Eingin semja

Á middegi í gjár fekk venjarin hjá VÍF, Dia Midjord, at vita, at samstarvið millum hann og VÍF var steðgað. Dia sigur, at hann hevði einki fingið at vita um hetta áðrenn. Hann noktar tó fyri, at venjari og nevnd vóru samd í hesi avgerð.

- Nei, har var eingin semja millum venjara og nevnd. Nevndin hevur sjálv tikið avgerðina, og hetta má eg so bara góðtaka. Nevndin velur kanska hesa avgerðina fyri at fáa ein sjokkeffekt fram ímóti finaludystunum.

Í tíðindaskrivinum sigur VÍF eisini, at avgerðin er grundað á, at samstarvið millum venjara og leikarar hevur ikki verið eftir vild síðstu dystirnar. Spurdur hvat hann helt um samstarvið sigur Dia, at hann helt tað vera á eini leið.

- Eingin leikari hevur meldað nakra ónøgd út fyri mær, og tí kenni eg einki til, at samstarvið millum okkum ikki hevur verið eftir vild. Tá man hevur 14 góðar spælarar vil onkur tó altíð vera ónøgdur eftir onkran dyst.

Mánadagin eftir hvønn dyst plaga leikararnir í Vestmanna at hava spælarafund, har teir tosa um farna dystin, og eftir tapið fyri KÍF fyri tveimum vikum síðani varð venjaraspurningurin m.a. uppi og vendi.

- Eftir tapið fyri VÍF høvdu vit sjálvsagt ein spælarafund mánakvøldið. Eg var ikki sjálvur til staðar á fundinum, og tí tosaði Ingi við spælararnar. Sum eg havi skilt, so bleiv hesin fundurin heldur longri enn vanligt, og m.a. tosaðu spælararnir um venjararspurningin. Sum eg skilti eftir fundin, so høvdu spælararnir ongar at finningar ímóti venjarunum.

Dia leggur tó at enda dent á, at hann ikki er beiskur um avgerðina hjá nevndini, men hann heldur at grundgevingarnar kanska ikki eru tær røttu.

- Um nevndin heldur, at úrslitini hava verið ov svingandi í ár, so skilji eg væl, at VÍF vil royna okkurt nýtt.

## Keðilig gongd

**Gongdin hjá VÍF hevur ikki verið tann besta í endaspælinum. Í teimum níggju dystunum er tað bert blivið til níggju stig hjá oddaliðnum**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

VÍF er helst mest sigursvanda felagið í Føroyum síðstu 15 árini. Felagið hevur vunnið fleiri meistaraheiti umframt onkra steypakapping, og í so máta hevur árið í ár ikki verið nakað undantak.

VÍF hevur ligið á odda í bestu mansdeildini mest sum allan vegin, men í endaspælinum hevur gongdin tó ikki verið tann besta. Av teimum fyrstu níggju dystunum hevur VÍF bert fingið níggju stig, og hetta hevur gjørt, at fleiri lið hava trýst VÍF í teirra royndum at røkka finaluni.

Leygardagin tapti VÍF so aftur, men úrslitini hetta vikuskiftið lagaðu seg tó soleiðis, at VÍF allíkavæl er klárt til finaluna. Onkur ónøgd hevur tó helst verið um svingandi úrslitini, tí í morgun sendi VÍF tíðindskriv út, sum segði, at samstarvið millum felagið og venjaran er steðgað.

Úrslitini hjá VÍF hava annars verið hesi í endaspælinum:

| | |
|---|---|
| VÍF – StÍF | 28-21 |
| KÍF – VÍF | 29-22 |
| H71 – VÍF | 34-44 |
| VÍF – Neistin | 28-28 |
| Kyndil – VÍF | 35-30 |
| StÍF – VÍF | 29-36 |
| VÍF – KÍF | 26-27 |
| VÍF – H71 | 43-28 |
| Neistin – VÍF | 36-28 |
| VÍF – Kyndil | ?-? |

## Venjaraskifti í VÍF

HONDBÓLTUR
*Tíðindaskriv*
*Mánakvøld 12.03.2007*

Manshondbóltsliðið hjá VÍF í Atlantic Airways–deildini fær nýggjan venjara frá í dag at rokna.

Lars Nedergaard, fyrrverandi venjari hjá VÍF og føroyska landsliðnum, hevur játtað at taka venjarauppgávuna á seg. Hann tekur við venjarastarvinum eftir Dia Midjord.

Seinastu dystirnir hjá VÍF hava verið merktir av, at samstarvið millum venjara og leikarar hevur ikki virkað eftir vild. Tí eru partarnir samdir um at steðga samstarvinum.

VÍF takkar fráfarandi venjara, Dia Midjord, fyri gott samstarv seinastu 3 árini, og felagið ynskir honum alt tað besta.

Blíðar heilsur
**Vestmanna Ítróttarfelag**